## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Um morgunin upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Seinnapartin lot av landsynningi og suðri og sirm ella mjørki. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og suðri og fyrrapartin møguliga regn, men annars yvirhøvur turt og sólglottar, tó mjørki í støðum. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt. Týsdagin veksur hann vindin upp í hvassan vind og ælingur. Hitin millum 7 og 11 stig.

# Smyril fær seg royndan



Tá ið talan var um at keypa Smyril, vóru atfinningarnar harðar, tí tað skuldi ikki vera egnað at sigla í so ringum umstøðum, sum í Føroyum. Skipið var flatbotnað og var bygt til at sigla á deyðavatni í Danmark og í Føroyum fór tað at koppa, tað svitaðist ikki. Nú eru 30 ár síðani Smyril kom og hann hevur sanniliga staðið sína roynd. Hóast tað mangan hevur leikað hart á, hevur hann trúliga pløgt Suðuroyarfjørð og tað eru ómetaliga fáir túrar, hann hevur avlýst- og tá hevur tað ikki altíð verið fyri veður, men tí at onki ferðafólk hevur verið.

Tað er komið okkum fyri oyrað, at øll hesi árini hevur Smyril ongantíð avlýst sigling ein heilan dag fyri veður og tá ið hann hevur avlýst ein túr, hevur hann siglt seinni ístaðin. Og samanumtikið er full semja um, at Smyril hevur verið suðuroyingum ómetaliga hentur.

Hesa vikuna hevur verið av ringastu líkindum, men Smyril sigldi við sama lag. Eisini mikudagin var sera ringt og hendan myndin vísur, hvussu tað kann síggja út, táið Smyril stevnir út av Trongisvágsfirði ein óveðursdag. Tað sær út sum um hann er á veg undir kav.

Hesa myndina tók Bjarni Nygaard av Smyrli á veg út av Trongisvágsfirði seinnapartin mikudagin.

Nú siglur Smyril sín svanasong og hetta verður seinastu vetur, hann verður álitið hjá suðuroyingum, tí vil ikki heilt illa til, kemur nýggjur Smyril einaferð í summar, ella tíðliga í heyst.

**-áki**

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -6 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | -5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -2 |
| Seyðisfjørður | -1 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 17 |
| Tromsø | 3 |
| Bergen | -- |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | -5 |
| Moskva | -3 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 6 |
| Kiev | 5 |
| Bukarest | 15 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 17 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 19 |
| Athen | 18 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 8 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | -- |
| New York | 5 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 980 hPa. í útsynning úr Íslandi fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani til Suður-Noreg fer eisini spakuliga norðureftir.




**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Atlantshavinum á 50N-37V fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani til Skotlands verður yvir Føroyum leygarnáttina.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 16/3 kl. 06[00]– 17/3. 06[00]. Hitin í gjár: 3,0°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 5,5 mm – mált frá 16/3 kl. 06[00]– 17/3 kl. 06[00]
Avfallið higartil í mars: 20,3 mm

Sosialurin

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

### VESTFALLSKYRRINDI

18. mars

17. mars Fyrra kvarter
19. mars Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18.mars | 00.51 | 13.30 | - | 12.30 | 00.06 | 12.45 | 02.51 | 15.30 | 03.51 | 16.30 | 11.45 | - | 10.45 | 23.24 | 01.06 | 13.45 | 02.06 | 14.45 | 00.36 | 13.15 | 01.51 | 14.30 |
| 19.mars | 02.09 | 14.34 | 01.09 | 13.34 | 01.24 | 13.49 | 04.09 | 16.34 | 05.09 | 17.34 | 00.24 | 12.49 | 11.49 | - | 02.24 | 14.49 | 03.24 | 15.49 | 01.54 | 14.19 | 03.09 | 15.34 |
| 20.mars | 03.00 | 15.22 | 02.00 | 14.22 | 02.15 | 14.37 | 05.00 | 17.22 | 06.00 | 18.22 | 01.15 | 13.37 | 00.15 | 12.37 | 03.15 | 15.37 | 04.15 | 16.37 | 02.45 | 15.07 | 04.00 | 16.22 |
| 21.mars | 03.44 | 16.04 | 02.44 | 15.04 | 02.59 | 15.19 | 05.44 | 18.04 | 06.44 | 19.04 | 01.59 | 14.19 | 00.59 | 13.19 | 03.59 | 16.19 | 04.59 | 17.19 | 03.29 | 15.49 | 04.44 | 17.04 |
| 22.mars | 04.25 | 16.44 | 03.25 | 15.44 | 03.40 | 15.59 | 06.25 | 18.44 | 07.25 | 19.44 | 02.40 | 14.59 | 01.40 | 13.59 | 04.40 | 16.59 | 05.40 | 17.59 | 04.10 | 16.29 | 05.25 | 17.44 |

5 707265 100050 >